# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI
# MATR. NR. 877m VIÐ DALASTÍG, TÓRSHAVN

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, matr. nr. 877m við Dalastíg í Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðarbygging á økinum.

Stk. 2. Útstykkingin er 1900 m$^2$ til støddar og liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Útstykkingin hevur felags tún og felags parkeringspláss.

Stk. 4. Vegir, felags tún og gøtur skulu gerast samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 5. Sambært kap. IV, §5, stk. 9 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at í serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrliga avmarkað øki kann verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 6. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Økið skal nýtast til bústaðir. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokking fyri Vinnustykkir í Tórshavnar kommunu, samtykt av býráðnum 11. desember 2014, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

## §4 VEGIR

Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

## §5 GØTUR, FRÍØKIR OG FELAGS PARKERINGSØKIR

Kortskjal 2 vísir, hvar gøtur, felags tún og felags parkeringsøkir skulu staðsetast.
Stk. 1. 16 p-pláss verða á felags parkeringsøki.

Stk. 2. Gøtur og fríøki sum er lagt av til spælipláss skulu planerast og hava fasta álegging.

## §6 BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

Í sambandi við byggistig og nýtslustig verður víst til almennu byggisamtyktina.

Stk. 2. Byggjast skulu 12 íbúðirinnanfyri økið í kortskjali 2, skipan av økinum.

Stk. 3. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §7 ÚTSJÓND HÚSANNA

Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifulltrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §8 BYGGING IÐ ER

Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## §9 BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggimyndugleikin og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §10 UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 19/00367 |
| Ætlanarskriv: | 4/7-2019 |
| Góðkent: | 12/7-2019 |
| Váttað: | |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging á matr. nr. 877m við Dalastíg, Tórshavn | | | | |
| **Undirheiti** | Matr. nr 877m | | | | |
| Tekning nr. | 1 | | | | |
| **Dagur** | 04.07.2019 | **Journal** | 18/03670 | **Teknað** | SNT |




## Tórshavnar Kommuna
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging á matr. nr. 877m við Dalastíg, Tórshavn | | | | |
| **Undirheiti** | Skipan av økinum | | | | |
| **Tekning nr.** | 2 | | | | |
| **Dagur** | 04.07.2019 | **Mát** | 1:800 | **Tekna** | SCF |

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

12. juli 2019
**Mál**: 19/00367-10
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

**Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 877m við Dalastíg**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna við skrivi dagfestum 8. apríl 2019 sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 877m við Dalastíg í Havn til góðkenningar.

Serstaka byggisamtyktin snýr seg um at skipa økið við tveimum íbúðabygningum við til samans 12 íbúðum.

Uppskotið hevur ligið alment frammi frá 5. januar til 2. februar 2019. Tá ið freistin at koma við mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, hevði kommunan fingið eitt mótmæli frá grannum til økið, sum uppskotið fevnir um. Kommunan hevur ikki gingið mótmælinum á møti.

Kommunan upplýsir, at økið frammanundan er ætlað til bygging, og at uppskotið til serstaka byggisamtykt skal skipa ta ítøkiligu byggiætlanina. Kommunan upplýsir harumframt, at lagt er upp fyri støddini á økinum, vegakervinum, parkeringsviðurskiftum og vendiplássi, at uppskotið samsvarar við bústaðarpolitikkin hjá kommununi, og at allar vanligar ásetingar um frástøðu frá marki, hædd o.s.fr. eru hildnar.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur tann 24. apríl 2019 fingið ískoytisviðmerkingar til mótmælisskrivið frá 29. januar 2019.

Býarskipanarnevndin hevur havt uppskotið saman við mótmælinum og ískoytisviðmerkingum til ummælis og mælir uttan viðmerkingar til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur viðmerkingarnar hjá Tórshavnar kommunu til tað innkomna mótmælið til eftirtektar og fer at fylgja tilmælinum frá Býarskipanarnevndini um at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 877m við Dalastíg. Ískoytisviðmerkingarnar til mótmælisskrivið geva heldur ikki Heilsu- og innlendismálaráðnum orsøk til at ikki at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 877m við Dalastíg í Havn.

Mint verður á, at hóast Heilsu- og innlendismálaráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguliga aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum, eitt nú friðingarmyndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt byggisamtyktartekstur við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri